## Uppgávan – SSP-lærarin

Skúlin er helst týdningarmesti pallurin í SSP-samstarvinum, og allir skúlar hava tilknýtið til ein SSP-lærara. Uppgávan hjá SSP-lærararanum er yvirskipað at arbeiða við trivnaði og fyribyrging á øllum floksstigum í einstaka skúlanum.

SSP-lærarin hevur ávíst tímatal hvørja viku, sum verður nýtt til SSP-arbeiði. Tímatalið verður ásett út frá støddini á skúlanum.

Uppgávurnar hjá SSP-lærararanum eru, at:

1. Taka lut í fundum í SSP-økisbólkinum og vera sambindingarliður millum skúlan og SSP-økisbólkin.
2. Miðla vitan um SSP-samstarvið í økinum og um tiltøk/átøk til hinar lærararnar, næmingarnar og foreldrini.
3. Vegleiða á skúlanum um tilfar og undirvísing í SSP-høpi.
4. Fylgja væl við tí, sum fer fram millum næmingarnar á skúlanum.
5. Ráðgeva starvsfelagum á skúlanum í einstaklingamálum.
6. Samskipa SSP-átøk á skúlanum.